## HEILSANIR



**Góða elskaða Fríða**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða fitta Fríða**
Vit ynskja tær tillukku við tínum fyrsta føðingardegi. Nú ert tú blivin ein ordiliga stór didda.
**Heilsan Lydia og Símun**



**Góði elskaði Rani**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum 24. apríl.
**Ynskja mamma, babba, Høgni og Bartal**



**Góða elskaði Jógvan Tobias**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum.
**Ynskja mamma. babba, Irena og Regin**



**Góði elskaði langabbi**
Eg ynski tær hjartaliga tillukku á tínum 90 ára føðingardegi.
**Ró**



**Góða Oda**
Vit ynskja tær hjartaliga til lukku við 20 ára føðingardegnum. Vit ynskja tær alt tað besta á lívsleið tíni.
**Ynskja mamma, babba, Amon og Tróndur**



**Hey Neli**
Hjartaliga tillukku við degnum. Nú verður tú 29 ár. Royn nú og finn tær eina fitta tussu. Góða eydnu, tað fær tú brúk fyri.
**Vit í Klaksvík**





Kom og steðga vónloysinum

Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«


# HALDIÐ SOSIALIN




**400,-** um ársfjórðingin
- sparið **450,-**
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800
FAX 341801 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:







# Góðan Morgun Føroyar og Bryggjuprát í Danmark

TÍÐINDASKRIV

Í døgunum 27. apríl til 30. apríl verður »Góðan Morgun Føroyar« send beinleiðis av Norðurbryggjuni í Keypmannahavn. Útgerðin er longu send til Danmarkar, og týsmorgunin er manningin til reiðar at práta við persónar, sum fara at greiða okkum frá lívi sínum í Danmark – við høvuðsdenti á høvuðsstaðin. Talan er fyrst og fremst um prát við føroyingar og viðkomandi danir. Umframt persónligu søgurnar, verður vitjað á áhugaverdum støðum. Og úr útvarpsstovuni á Norðurbryggjuni fara so kend nøvn sum Guðrun Sólja Jacobsen at bjóða okkum livandi tónleik. Á Norðurbryggjuni fara vit harumframt at fregnast, hvussu húsið hevur hildnast higartil.

Tá »Góðan morgun Føroyar« endar kemur ein gestur í útvarpsstovuna til »Bryggjuprát«. Henda sendingin hevur sum endamál at lýsa ein gest, hansara fortíð, samtíð, royndir og ætlanir. Fókatingsmaðurin Naser Khader, og Svend Thulesen, stjóri, hava játtað at vitja á Bryggjuni. Mikudagin fer frændamaðurin, Eyðun Nolsøe, at bera okkum livandi tónleik úr útvarpsstovuni á Bryggjuni, umframt at siga okkum frá lívi og hugsjónum sínum.

»Góðan Morgun Føroyar« verður send frá 7.35 til 09.00. Og "Bryggjuprát" verður sent frá kl. 09.03 til 09.50.

Vertur er Jákup Magnussen, reportarar eru Bjarni Mohr og Dia Midjord og tøkningur er Eyðbjørn við Skipá.

**Leygardagur 19.05:**

## »Landið handan ísin«

Fyri meiri enn 2000 árum síðani hildu menn, at eitt stórt land var sunnast á sunnaru jarðarhálvu. Tað var neyðugt, fyri at Jørðin kundi varðveita javnvágina, hildu teir. Tað eru ikki meiri enn hundrað ár, síðani veruleikin bleiv staðfestur, men tað var aftan á nógvar og spennandi rannsóknarferðir eftir landinum handan ísin.

**Sunnudagur kl. 16.00**

## Frásøgn frá fótbólti

Landskappingin í fótbólti byrjar sjálvan flaggdagin. Útvarpið fer undir frásagnir sínar beinanvegin, og sunnudagin verður sagt frá tveimum dystum.




**Vika 17 – 21. apríl**
Vinnaratøl: **02 - 03 - 06 - 07 - 15 - 18**

Eykatøl: **30 - 38**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **1.905.072,- kr.** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **112.507,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **2.029,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **78,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **33,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## GJALDOYRAKURSIR

| *Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum* | | 21.04.04 | Ultimo mars 2004 |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 628,7900 | 609,0300 |
| Bretland | **Pund** | 1113,7800 | 1118,0100 |
| Svøríki | **Króna** | 81,2600 | 80,4100 |
| Noreg | **Króna** | 89,8800 | 88,2500 |
| Sveits | **Frankur** | 478,5700 | 477,4100 |
| Ísland | **Króna** | 8,5300 | 8,4300 |
| Kanada | **Dollari** | 462,0300 | 465,9100 |
| Japan | **Yen** | 5,7341 | 5,8634 |
| | **Evra** | 744,2300 | 744,4800 |

FØROYA SPARIKASSI

## KROSSORÐ




**Vinnari:**
*Høgni Høgnesen*
*490 Strendur*

### Loysnin frá seinastu viku
### Loysunarorðið: LÍVSTRYGGING




### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**372**

**Loysunarorðið:** ..............................................

Navn: ..............................................................

Bústaður: ........................................................

Bygd/býur: .......................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***
- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***
- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***